Til allar dómarar okkara sum døma í hesum kappingum, og feløgini sum hava lið í hesum kappingum:

| | |
|---|---|
| **Effodeildin** | **U18 Dreingir** |
| **1. deild menn** | **U18 Dreingir Steypakappingin** |
| **2. deild menn** | **1. deild kvinnur** |
| **Løgmanssteypið** | **Steypakappingin kvinnur** |

Fyri at hækka støðið á úrslitatænastuni hjá FSF og sum ein hjálp hjá feløgunum, fjølmiðlunum og almenninginum yvirhøvur at fylgja betri við, hevur FSF gjørt eina avtalu við FaroeSoccer v/Marna Mortensen um at innheinta og innlesa dómaraseðlarnar í omanfyri nevndu kappingum í ein dátugrunn beint eftir loknan dyst.

Seðlarnir/dystirnir verða síðani vístir í fullum elektroniskum líki á heimasíðuni **www.faroesoccer.com**. Hetta merkir, at bæði úrslit, støða, mál og kort v.m. er dagført og tøkt hjá øllum at síggja, so skjótt sum seðlarnir eru innlisnir. Informatiónin verður partvíst eisini at síggja á **www.fsf.fo**.

**Fyri at hetta samstarvið skal rigga optimalt, skulu dómaraseðlarnir sendast FaroeSoccer beinanvegin eftir loknan dyst – og ikki seinni enn ein tíma aftaná.**

FSF heitir á dómararnar og feløgini, sum eru umfataði av hesi avtaluni – serliga 1. og 2. deild menn, U18 Dreingir og 1. deild kvinnur – um at samstarva best møguligt, so dómaraseðlarnir kunnu koma uppá rætta pláss beinanvegin eftir loknan dyst. Hetta er eisini galdandi fyri steypakappingarnar.

Fyri Effodeildina og 1. deild menn verður eisini víst til STEVNA 2014 (Fyrisitingarlig viðurskifti) um dómaraseðlarnar. Feløgini í hesum báðum deildum hava sambært stevnuni skyldu at hava fólk og útgerð við vøllin at taka sær av dómarunum og dómaraseðlunum.

Eitt gott hugskot til dómararnar er at **goyma øll dómarakortini**, til kappingin er lokin.

Dómaraseðlarnir kunnu sendast sum pdf fíla ella sum myndir til **fotboltshagtol@gmail.com** ella til **telefaks 320516** (Marni Mortensen).
Seðlarnir kunnu eisini latast Marna persónliga (til avriting) í Maritugøtu 75, Hoyvík.
Marni kann eisini røkkast á **telefon 320515** ella **520515**.

Heitt verður eisini á feløgini um at upplýsa FaroeSoccer **klokkutíðirnar** (og broyttar tíðir) til dystirnar í nevndu kappingum, so skjótt sum hesar eru ásettar, hetta so øll kunnu síggja, nær dystirnir byrja og hava ein kjans at síggja teir.

**Gevið gætur:**
FSF skal tó framhaldandi hava originala dómaraseðilin fyri at rinda dómarapengarnar. Hetta merkir, at telefaks og skannaðir seðlar v.m. er vanliga IKKI er nøktandi til hetta endamálið.

Vinarliga latið/sendið FSF allar **aðrar** dómaraseðlar beinleiðis sum vanligt (skjótast tilber).

*Vit spæla saman*
**Fótbóltssamband Føroya**
**Føroya Dómarafelag**
**FaroeSoccer**